Nr. 119/2019

Høgni Hoydal
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um broytingar í nevndum og ráðum síðani løgtingsvalið 2019, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvørjar limir í fastar almennar nevndir, ráð, stýri, grunnar, partafeløg og almenn partafeløg v.m., sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum velur, hevur landsstýrismaðurin valt síðani løgtingsvalið 2019 (navn, bústað, starv, starvsroyndir, royndir/útbúgving, onnur størv í nevndum og ráðum v.m.)?
2. Hvørjar limir í almennum nevndum, ráðum, stýrum, grunnum og almennum partafeløgum v.m. hevur landsstýrismaðurin skift út síðani løgtingsvalið 2019 (navn, bústað, starv, starvsroyndir, royndir/útbúgving, onnur størv í nevndum og ráðum v.m.)?
3. Hvør er sakliga grundgevingin í hvørjum einstøkum føri fyri hvønn persón, ið landsstýrismaðurin hevur valt/valt frá?
4. Hvør fyrisitingarlig viðgerð og skjalfesting av valinum er farin fram í hvørjum einstøkum vali/frávali, og hvør hevur í hvørjum einstøkum føri tilmælt at velja ella velja teir ávísu limirnar frá?
5. Hvussu leingi hava teir limir sitið, sum landsstýrismaðurin hevur vrakað?
6. Hvørjar eru samsýningarnar í hvørjum einstøkum føri til limirnar?
7. Vil landsstýrismaðurin senda Løgtinginum avrit av øllum viðkomandi fyrisitingarligum skjølum og grundgevingum í hvørjum einstøkum máli?
8. Hvørjir og hvussu nógvir av teimum limum, ið landsstýrismaðurin hevur valt síðani løgtingsvalið 2019, hava sitið á tingi fyri Fólkaflokkin, til hvat eru teir valdir og við hvørji fyrisitingarligari grundgeving, og hvør varð ikki afturvald/ur í teirra stað?
9. Hvør hevur í fyrisitingarligu viðgerðini skotið upp og tilmælt teir limir, ið hava sitið á tingi fyri Fólkaflokkin?
10. Er tað hent áður, at ein landsstýrismaður hevur valt fyrrverandi tingmenn úr egnum flokki í nevndir, ráð, stýri, grunnar, partafeløg ella almenn partafeløg – og um so er, hvørjar?

Viðmerkingar:
Undir koronatíðini hevur spyrjarin heft seg við, at útskiftingar og val av limum í nevndum, ráðum, partafeløgum og almennum partafeløgum eru farin fram. Men ongin viðgerð ella grundgeving fyri hesum hevur verið at sæð í almenna rúminum. Millum annað eru fyrrverandi tingmenn hjá Fólkaflokkinum valdir í týdningarmiklar nevndir. Tað kunnu sjálvsagt vera týðandi sakligar og fyrisitingarligar grundgevingar fyri øllum valum.
Spyrjaranum vitandi er tað tó ikki hent áður undir Stýrisskipanarlógini, at ein landsstýrismaður hevur valt fyrrverandi tingmenn úr egnum flokki í týðandi nevndir,

stýri ella ráð. Til tess at fáa upplýsing um alt hetta verður fyrispurningurin settur landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 23. juni 2020

Høgni Hoydal